Starvslýsing

Børn & Ung: Stuðulsskipanin fyri børn

## Stuðulsfólkaskipanin fyri børn søkir eftir starvsfólkum við heilsufrøðiligari útbúgving

**Í Streymoy:**

Uppgávan er í løtuni at vera náttarvakt hjá barni við fjølbreki. Setunarbrøkur verður eftir avtalu. Setanartíðin er frá 01.04.2010

Um fólk við heilsufrøðiligari útbúgving ikki søkja størvini kann námsfrøðingur ella hjálparfólk vera sett.

## Stuðulsfólkaskipanin fyri børn søkir eftir starvsfólkum við námsfrøðiligari útbúgving

**Í Streymoy:**

Uppgávan er í løtuni at arbeiða eitt vikuskifti um mánaðin í skipaðari umlætting til børn við autismu. Talan er um 3 størv :

- Eitt starv seinnapart/kvøld fríggjadag og dagtímar/kvøld leygardag íalt 17 tímar.
- Eitt starv seinnapart/kvøld fríggjadag og dagtímar/kvøld leygar- og sunnudag íalt 30 tímar.
- Eitt starv við náttarvakt leygar-, sunnu- og mánanátt íalt 30 tímar.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Ragnhild Dahl tel 236502, Joan Olsen tel 236501, Karin á Heygum tel. 236508 og Hanna Juul tel 236521.

**Setanartreytir**
Um ongin námsfrøðingur søkir starvið, kann hjálparfólk verða sett. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal sendast til:
Nærverkið, Børn og Ung,
Stuðulsfólkaskipanin fyri børn,
Argjaboðagøta 7,
160 Argir.

**Umsóknarfreist: 19. mars 2010**

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn er skipan undir Børn og Ung á Nærverkinum, sum veitur stuðul til heimabúgvandi børn, ið bera brek í aldrinum 0 til 18 ár. Stuðulsfólkaskipanin fevnir um alt landið. Arbeitt verður í toymum og í heimunum. Arbeiðstíðirnar fevna um alt samdøgrið. Dagstovnurin Reiðrið er ein partur av Stuðulsfólkaskipanini fyri børn. Uppgávurnar eru pedagogisk menning, røktaruppgávur, ansing og fylgjara-uppgávur tillagaðar einstaka brúkaranum. Skipanin veitir stuðul til umleið 100 børn og hevur umleið 70 ársverk.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo



SKÚLAFLOKKAR · ÍTRÓTTARFELØG · PENSJÓNISTAR · ARBEIÐSPLÁSS · BINDIKLUBBAR · GONGUFELØG

## Vælkomin til Íslands

Skipað verður fyri ferðum kring Ísland, m.a. til Gullfoss, Geysir, Tingvellir og Bláa Lón.

***TOSAÐ VERÐUR FØROYSKT***



**Bæði stórir og smáir bussar**
Tel. +354 861 3426 · davidsam@simnet.is

**Davíð Samúelsson,**
Góðkendur ferðaleiðari

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA

# CAMBRIDGE EXAMINATIONS

***First Certificate in English (FCE)***

***Certificate in Advanced English (CAE)*** og

***Certificate of Proficiency in English (CPE)***

**Tilmeldingarfreistin til próvtøkurnar í mai/juni 2010 er úti 19. mars 2010 kl. 12.00**

Tilmeldingargjald:

| | |
|---|---|
| First Certificate in English | 1.300,00 kr. |
| Certificate in Advanced English | 1.400,00 kr. |
| Certificate of Proficiency | 1.500,00 kr. |

Tilmeldingarblað er at finna á heimasíðu okkara – www.setur.fo og kann fáast við at venda sær til Setursskrivstovuna kl. 9.00 - 16.00.

**Tilmeldingarblaðið skal verða Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 19. mars 2010.**

**Vegleiðing um gjaldið er at finna á tilmeldingarblaðnum.**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA

# ÍSLENDSKUR LESTRARSTUÐUL

Íslendska Mentamálaráðið bjóðar føroyingum at søkja stuðul (120.000 ísl.kr. um mánaðin í 8 mánaðir) til lestur í íslendskum máli og bókmentum á Háskóla Íslands lestrarárið 2010/2011

Upphæddin røkkur til vistarhald. Studentunum verður útvegað innivist á studentagarði, og húsaleigan verður goldin av studninginum.

Námið byrjar 1. september 2010 og endar 30. apríl 2011.

Umsóknir skulu vera Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. mars 2010. Umsóknarblað og kunning fáast á www.hi.is, www.setur.fo ella við at venda sær til Setursskrivstovuna.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

Søgu- og samfelagsdeildin bjóðar í vár út stak masterskeiði í løgfrøði "Mannarættindi og revsirættur í Føroyum". Skeiðið kann eftir umsókn gerast partur av masterútbúgving.

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA

Enn eru nøkur pláss eftir

# Stakskeið í løgfrøði – »Mannarættindi og revsirættur í Føroyum«

Stakskeiðið í løgfrøði ber heitið »Mannarættindi og revsirættur í Føroyum« og telur 10 námsstig á masterstøði, og ætlanin er, at skeiðið skal verða góðskrivað á komandi masterútbúgving í lóg.

Undirvísingin byrjar fríggjadagin 9. apríl 2010. Munnlig próvtøka verður 21. og 22. juni 2010.

Lærari verður Kári á Rógvi, PhD, lektari. Eisini verða gestafyrilesarar.

Endamálið við skeiðnum er at veita innlit í týdning fyri og ávirkan á revsirætt av mannarættindum, serliga Europeiska Mannarættindasáttmálanum. Tey lesandi skulu fáa nøktandi innlit í revsing og mannarættindi til tess at kunnu eyðmerkja og greina trætur, har hesar rættarreglur fáa týdning í senn og tí bæði møtast og skulu avvigast.

Skeiðið kannar bæði almennar og serstakar spurningar á mótinum millum revsirætt og mannarættindi. Meginreglur sum legalitetsprinsippið í § 1 í verandi donskføroysku revsilóg og forboðið móti afturvirki í grein 7 í EMRS verða viðgjørd. Harumframt verður hugt at tulkingarstíli og venju hjá bæði norðurlendskum dómstólum og Europeiska Mannarættindadómstólinu m. Evni sum framsøgufrælsi og trúarfrælsi í samvirkan við revsirætt eru somuleiðis sera týðandi. Skeiðið er serliga viðkomandi, nú ætlanir eru at yvirtaka revsirætt sum føroyskt sermál.

Undirvísingin verður skipað við framløgum frá lærara og gestafyrilestrarhaldarum – ætlandi dómarum og lærdum úr grannalondum og Føroyum. Eisini verða studentaframløgur.

Próvtøkuformur: Skrivlig avrik telja 1/3 av próvtalinum, munnlig próvtøka 2/3. Uttanseturs próvdøming

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er útbúgving á bachelorstigi við nóg mikið av løgfrøði ella javnmettum fakum eitt nú grundskeiði í lóg.

**Skeiðið kostar 5.500,00 kr.** Lesandi innskrivað við Fróðskaparsetur Føroya ella við annan hægri lærustovn fáa tó skeiðið ókeypis.

Umsóknarblað fæst við at venda sær til Søgu- og samfelagsdeildina, J. Broncks gøta 25, 4.h., Tórshavn, tlf. 352580. Víst verður eisini til heimasíðuna: www.setur.fo

**Avmarkað luttøka.**

**Umsóknarfreistin er sett til fríggjadagin 19. mars 2010. Tikið verður tó upp, til skeiðið er fullsett.**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo